## DAGSINS MEINING

# Trý ár í kyksendi

Mánadagin komandi eru trý ár liðin, síðan tey sameindu við USA á odda lupu á Irak. Endamálið við álopinum var at forða Saddam stýrinum at menna og nýta hópoyðingarvápn og at fáa Saddam burtur. Tað seinna eydnaðist – hitt fyrra fleyt út í sandin, tí eingi hópoyðingarvápn vóru í Irak. Eftirfylgjandi hava tey sameindu so sett fokus á yvirgangin. Ikki tí einki bendir á, at Saddam stýrið stuðlaði t.d. Al Qaida – tað hevði verið alt ov vandamikið og fyri alt tað móti politikki Saddams, ið ikki var fundamentalistiskur, men tvørturímóti vildi eitt sekulert einaræði.

Síðan kríggið byrjaði hava storir trupulleikar verið í Irak. Tað er lítið at ivast í, at tað var ein vinningur fyri heimin, at Saddam varð koppaður og aðrir glottar eru í tilgongdini. Tað má soleiðis ásannast, at tað var eitt bragd at fáa framt bæði fólkaatkvøðu og tjóðartingsval í einum hersettum landi uttan demokratiskar siðvenjur. Hinvegin er tað ein vanlukka, at ikki eydnast at skipa eina demokratiska stjórn við parlametariskum støði í tjóðartinginum. Tað tykist sum heild mestsum ómøguligt at seta á stovn og at fáa demokratiskar stovnar at virka. Hetta er serstakliga galdandi fyri herin, løgregluna og lokalsamfelagið. Hóast vesturlendsku tiltøkini, so kiksar alt hetta ferð eftir ferð. Hetta kemst av, at demokrati er ikki nakað, ið tú kanst læra eftir einum degi. Demokrati er ein lívsformur. Hetta skilja amerikanar ikki og enn minni irakar skilja hetta. Hersetingin hjá teimum sameindu í Irak er tí vorðin til ein sorgarleik.

Støðan í Irak gerst alt meira trupul fyri hvønn mánaða, sum gongur. Hóast valini, so rekst einki fyri, at landið fær nakra stjórn. Stríðið millum Shia og Sunni muslimar er nú so hart, at alt fleiri eygleiðarar tala um beinleiðis borgarakríggj. Borgarakríggj er tað alraversta, ið kann henda fyri Irak. Verður borgarakríggj meta allir eygleiðarar, at hetta fer at standa við í nógv ár og fer at oyðileggja landið og destabilisera Miðeystur enn meira. Hersetingarvaldið við USA á odda hevur ómetaligar trupulleikar. Yvirgangurin stendur við og versnar, og alt bendir á, at altjóða yvirgangsfelagsskapir hava valt sær Irak sum høvðusmál. Tað er sum ikki einaferð sivilfólkið, sum er offur fyri hesum harðrenda yvirgangi. Irak er vorðið eitt slag av altjóða venjingarvølli fyri sjálvmorðsatsóknir. Hesin yvirgangur hevur sum endamál at forða fyri eini demokratiskari tilgongd í Irak. Sum er, sær tað veruliga svart út og nógv bendir á, at yvirgangsliðini eru við yvirlutan. Hetta er ein av orsøkunum til, at so torført er at skipa stjórn. Sum ofta sagt gevst eingin hernaðarlig loysn í Irak. Her kann bert ein politisk loysn loysa trupulleikarnar. Men henda loysn er torfør at fáa til vega, eitt nú tí USA trýr meira á hernaðarligar loysnir enn á politiskar loysnir. Danmark, sum er við at søkka í hetta kyksendið saman við USA, átti kanska at sagt USA nakrar sannleikar her og nú.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um at vera skrivandi fólk í Føroyum

**DAGNY JOENSEN**
Rithøvundur



Tað er áhugavert og gevandi, at alt fleiri ummælarar viðgera útgávur – bókmentir av øllum handa slag, sum koma út serliga um jóltíð í Føroyum. At ummælararnir eru útbúgvið fólk, sum hava skil fyri bókmentatilfari, er gagnligt, men eitt ummæli skal ikki vera ein kapping um, hvørt ummælarin veit meira um bókmentir enn rithøvundin.

Ummælarin skal helst vera rithøvundinum til hjálpar og vera positivur í sínum kritikki. Tað kann gagna tí sum skrivar og geva innlit um teknisk viðurskifti, sum óroyndur rithøvundur kanska als ikki veit um.

**Fyrr í tíðini**

Eg tosaði við ein rithøvund einaferð í áttatiárunum, sum hevði útgivið fleiri bøkur, men hann hevði ongantíð fingið eitt ummæli.

Sum Marius Johannesen, sáli, einaferð segði mær um eitt ummæli hann hevði í Tingakrossi fyri nógvum árum síðan. Hann kundi bert siga, at: " Bókin liggur væl í hondini". Hann kendi familjuna hjá rithøvundanum, og vildi ikki fornerma tey, men helt eisini, at hann ikki vildi forskrekkja hetta unga menniskja, sum hevur skrivað bókina.

**Ikki alt er lesiverdugt**

Nú eru fleiri ummælarar, men tíverri fara nakrir so illa við teimum, sum hava skrivað – ja, við hvørt tykist tað sum ummælarin vil siga – "hvat billar tú tær inn, at skriva."

Tað er sjálvandi ikki rætta framferðin, tí vit hava skrivifrælsi og tí er orðið er frítt. Bert er spell, at tilfar kemur út, sum kanska skuldi verið betur gjøgnumarbeitt, men eingin er at venda sær til, sum kann hjálpa teimum, sum halda seg hava eina góða søgu.

Tíverri hendir ofta, at tú fært eina bók upp í hondina, sum tú als ikki tímir at lesa, tí hon er so vánalig. Tað kemur eisini fyri onkuntíð við útlendskum bókmentum, men als ikki í so nógvum førum sum hjá okkum.

**Vil eingin – geva rithøvundarnir út**

Skrivaða orðið er so nýtt í Føroyum, og tað tykist sum hava vit ongantíð fingið lagt eitt haldgott grundarlag ella stýring av, hvat verður givið út. Vilja bókaforløgini ikki, so geva fólk sjálvi út. Tá ræður bert tilvildin, og ivaleyst hava nógv brent seg av hesum – til onga nyttu!

**Sjónleikur – dømi um menning**

Onnur listagrein er sjónleikur, sum er eins gamal og málið. Har hava fólk megnað at hildið leiklistini uppi og at menna hana, hóast tað hevur tikið drúgva tíð.

Hvat er at gera: Vit kundu stovnað eitt áhugafelag fyri skrivandi fólk – eins og MáF er fyri áhugaleikarar. Har kundu fólk fingið vitan og ráðgeving í skriving og at skipa tilfar til bókaútgávu, og ikki minst sloppið at tosa við ein kønan, sum kundi sagt skrivandi, um gávurnar – ikki bert at skriva – men serliga gávur at siga eina søgu, sum verður so áhugaverd, at vit tíma at lesa hana. Ikki øll hava hesar gávur, men kanska eru nøkur, sum hava gávur, men ikki dirvi og áræði at fara undir slíkt arbeiði, og tí ongantíð gera álvara av sínum ætlanum.

**Samtíðarójavni:**

Ummælarar halda at teir skulu viðgera føroyskar bókmentir á hædd við ummælarar í øðrum londum.

Tað haldi eg er skeivt, tí vit hava ikki somu fortreytir ella møguleikar at menna okkara skrivandi fólk og aðrar smátjóðir. Við einum fínum orði kallast tað samtíðarójavni ella usamtidighed, og tað vita teir útbúnu ummælarar, hvat er.

Harvið meini eg ikki, at ummælarar skulu tosa fólk eftir munninum, ella at geva teimum ein slutur fyri ein slatur.

Teir mugu taka útgangsstøði í okkara umhvørvi og viðurskiftum og finnast at og gera við, sum teir halda vera rættast í hvørjum einstøkum føri.

Ummælarar kunnu vera við til at læra skrivandi fólki, geva teimum ráð og leiðbeining, um tað sum er skeivt ella illa fráfarið – og teir skulu vera erligir í síni meting. Tað er óneyðugt at niðurgera hetta fólkslagið meira enn øll onnur fólk í samfelagnum. Rithøvundar, sum ditta sær at skriva, skulu ikki vera til spott og spei av ummælararum.

# Politiska visiónin 2015 og strategiskt *overload*

**REIDAR NÓNFJALL**



**Tað er fakliga áhugavert at fylgja gongdini í verkætlanini hjá landsstýrinum, um innihaldið og verksetanina av politisku visióini 2015**

Tað, sum eg serliga havi lagt til merkis er fyriskipanin av verkætlanini. Settir eru heildir 13 strategibólkar, sum hvør sær skulu lata frá sær eitt strategiskt upplegg fyri eitt viðkomandi øki.

Tað vandamikla við gongdini í løtuni er, at landsstýrið setur hesa verkætlanina so stórt upp, at tey, sum skulu verða við til at seta strategiætlanina í verk heilt einfalt ikki megna tað við verandi tilfeingi, stór og smá mál hvørt um annað, stuttar tíðarfreistir, vantandi førleiki og vantandi fíggjaroka Vandin íkemur eisini við, at organisatiónirnar ella stovnarnir o.a. verða yvirbelastaðir, vegna tað, at stórur partur av fyrreikingunum og verksetanini av strategiskum arbeiði vanliga skal gerast síðuleypandi við dagliga raksturin – og ikki við eyka tilfeingi (tí hugtakið strategiskt overload).

Harafturat er vert at leggja til merkis, at tað er sera truplult at seta fokus, tá so nógvir strategibólkar og økir verða umrødd. Tað er ein gyltur regul í strategiskum arbeiði at seta fokus á innsatsøkir, sum geva størst virðisøking, størst nyttuvirði ella besta búskaparliga úrslitið –tosað verður enntá, um at seta ekstremt fokus. Uttan fokus er stórur vandi fyri kreativiteti uttan ítøkjulig úrslit.

Eisini eigur hædd at takast fyri strategieftirmeting – hetta treytar mátingar innan útvald økir – eitt nú um ávirkanina á samfelag og vinnu. Við ikki at tryggja strategieftirmeting er vandi fyri, at avgerðartakarar og starvsfólk gera, sum tey eru von og arbeiða stuttsiktað – eitt nú við við dagligum rakstri og frá sak til sak.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.